# Nógv vilja bú



*- Vit hava eina heilt ótrúliga útsikt, sigur Petur*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Fyri 20 árum búðu bert 40 fólk í Kunoy, og lítið bendi á at bygdini fór at verða lív lagað í framtíðini. Í dag er øðrvísi, og ein hópur av sethúsum standa í gerð, millum annað tey hjá klaksvíkinginum Peturi Svøðstein.**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kunoy:** - Ja, her í Kunoy er gott at vera, slær hann fast.

Hann hevur verið búsitandi í bygdini tey seinastu 11 árini, men er nú í ferð við at byggja sær síni egnu hús sunnarlaga í bygdini.

Hetta er hann kortini ikki einsamallur um, tí ein skal ikki hava verið leingi í bygdini fyrrenn ein sær tað sama:

Í minsta lagi fýra onnur hús eru í gerð, og fleiri grundir standa til reiðar at arbeiða víðari við.

> „ *Tað er sjálvandi sera hugaligt at vita, at kunoyingar vilja seta búgv her. Men tað er uppaftur betri, um tey haraftrat koma aðrastaðni frá*

- Tað er gott, at tað fer at koma lív í bygdina, sigur Petur Svøðstein, sum dagliga er formaður á útróðrarbátinum Líðhamri í Klaksvík.

Tey eiga eina gentu sum gongur í 10. flokki og ein drong sum gongur í 5. flokki í Kunoyar skúla.

### Byggja nýtt

At Petur nú er farin at byggja sær egin sethús í Kunoy, kemur ikki av tí at hann á nakran hátt er heimleysur.

- Eg eigi frammanundan eini hús niðri í bygdini, men ynski nú at byggja mær eini nýggj, sigur hann.

Petur er upprunaliga úr Klaksvík, men hevur búð á Kunoyarvegi í Kunoy leingi, í roynd og veru í samfull 11 ár.

Leggjast skal aftrat, at kona hansara er ættað higani úr bygdini.

- Og tú veitst, hvussu tað er!, sigur hann við einum brosi, nú hann vísir umboðunum fyri Sosialin runt í húsum sínum.

### Lyklaklárt

Nógv sniðhús eru at velja millum á marknaðinum í dag, men hesi húsini hjá Peturi koma frá Norðsetur í Hvalvík.

Tá vit tosaðu við Petur fyri tveimum vikum síðani, var ikki meiri enn ein mánaður liðin, síðani teir byrjaðu at seta húsini upp.

Til støddar eru tey beint omanfyri 100 fermetrar, og sjálvur ætlar hann at tey kunnu sleppa inn í húsini á norðoyastevnu, sum verður fyrsta vikuskiftið í juni mánaði.

- Vit hava biðið um eini lyklaklár hús, so tá skuldi alt verið liðugt, sigur Petur, ikki sørt spentur á málinum.